

*Eysturarmurin á Skálafjørðinum er hart raktur, nú Faroe Seafood fór av knóranum Mynd: Vilmund Jacobsen*

limir í Arbeiðarafelagnum Hæddini.

**Góð kunning**

– Eingin græt, sum eg sá, tá tey høvdu fingið uppsagnarbrævið, men fólk eru ómetaliga kedd um støðuna – ikki minst, nú vit nærkast jólum.

Tað sigur Karla, tá vit spyrja hana, hvussu limir hennara og arbeiðsfólk annars tóku ímóti uppsøgnini í gjár.

– Eg haldi, at dagurin var ógvuliga væl skipaður, og fólk vóru fegin um ta kunning og hjálp tey fingu við eitt nú umsóknarbløðum.

Hon vísir á, at eisini kunnandi fundurin í Løkshøll í fyrradagin var upplýsandi og gevandi fyri tey raktu og tey, sum varða av hesum fólkum.

– Fundurin í Løkshøll var sera væl møttur. Eini 200 fólk lýddu á, og eg haldi, at fólk yvirhøvur vóru væl nøgd við kunningina.

Karla leggur dent á, at fólk vistu jú einki, tá ið tað hendi.

– Tey funnu jú ikki út av, hvussu støðan var, fyrr enn eftir, at tey vóru komin úr arbeiði fríggjadagin. Tá fingu tey at vita, at arbeiðsplássið hjá teimum var stongt og farið á húsagang, sigur Karla Einarsson, forkvinna í Arbeiðarafelagnum Hæddini.

Saltfiskavirkið Faroe Seafood á Toftum er sum kunnugt eisini stongt og tey, sum arbeiddu á virkinum, hava eisini fingið sína uppsøgn, kunning og hjálp til útfylling av umsóknarbløðum.

*vilmund@sosialurin.fo*





# Mortan loysir Eyðun av í FF

**VAL Nú sýsluformansval er í Føroya Fiskimannafelag í ár, er greitt, at Eyðun Johannesen og Fríðrik Sivertsen ikki lata seg stilla uppaftur. Mortan G. Berjastein er einasta uppskot í Eysturoyar sýslu og verður tí nýggjur í leiðsluni. Í Norðoyggjum verður eisini nýggjur sýsluformaður valdur, men her stríðast tvey valevni um sessin**

**Vilmund Jacobsen**

Val er í Føroya Fiskimannafelag á hvørjum ári. Triðja hvørt ár er felagsformansval, og sama er við sýsluformansvali og sóknarformansvali.

Í ár er sýsluformansval.

Leiðslan í Føroya Fiskimannafelag er felagsformaðurin og síðan eitt umboð úr hvørju sýslu.

Greitt er, at einki val verður í Eysturoyar sýslu. Eyðun Johannesen av Oyrarbakka, sum hevur sitið í leiðslu FF's í nógv ár, stillar ikki uppaftur.

Mortan G. Berjastein í Fuglafirði hevur latið seg stillað upp, men hevur einki mótvalevni. Tí er greitt, at Mortan verður nýtt umboð í Eysturoy – uttan val.

Karl Isaksen úr Kvívík hevur umboðað felagið, síðan Dia Højgaard í Vestmanna doyði.

Valið í Streymoy stendur millum Karl Isaksen og avbjóðaran, Axel Hansen.

Fríðrik Sivertsen hevur seinnu árini umboðað Fiskimannafelagið í Norðoyggjum, men letur seg ikki stilla uppaftur.

Valið í Norðoyggjum stendur millum Egil Finnsson og Magnus Paula Glerfoss, sum hava latið seg stillað upp.

Við tað, at Eyðun Johannesen og Fríðrik Sivertsen ikki lata seg stilla uppaftur, koma í hvussu er tvey nýggj umboð í nevndina sum taka við 1. februar í 2011.

Spurningurin er so, hvør kemur at draga longra stáið í Streymoyar sýslu, Karl Isaksen ella Axel Hansen, sum avbjóðari.

Sámal Poulsen, Sandvík, Andrias Berglíð, Sørvágur og Sniálvur Røvilsberg, Sandur, hava einki mótvalevnið og halda tí fram í leiðslu Føroya Fiskimannafelags, eisini eftir 1. februar.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Vann hálva miljón

Ein føroyskur spælari, sum hevur spælt við í Keno-spælinum hjá Danske Spil, vann hálva millión krónur og fekk harvið eina jólagávu tíðliga í ár.

Hepni vinnarin, sum er úr Vestmanna, hevði gjørt eina íløgu á 300 krónur – og gjørdist við Keno-spælinum seinasta sunnukvøld hálvur miljóningur.

Hann hevði keypt seðilin á Magnstøðini í Vestmanna.

Men hvat er Keno?

Jú, Keno er eitt talspæl við 70 tølum, har hvønn dag verða drigin 20 tøl. Tú skal velja tøl millum 2 og 10, og so ræður um at hava so nógv tøl rætt sum gjørligt.

Tín møguleiki fyri at vinna hongur saman við, hvussu nógv tøl, tú hevur valt. Sama er galdandi fyri møguligan vinning, sum avhongur av, hvussu stóra upphædd, tú hevur spælt fyri.

*vilmund@sosialurin.fo*